## Heldur um fjørðin

Leiðslurnar í kommununum í Sandoynni hava eftir øllum at døma lítlan hug at leggja oynna og Skúvoyar kommunu saman í eina kommunu. Borgarstjórin í Skopun hevur sagt nei, og kommunurnar á Sandi og í Skúvoy hava svarað landsstýrinum, at tær hava líka góðan hug at leggja saman við Tórshavnar kommunu. Borgarstjórin í Skálavík, Palli Jacobsen, sigur við Dimmalætting, at tað er náttúrligt at leggja saman við Suðurstreymoy.

## Listaframsýning

Mánadagin í næstu viku letur listakvinnan Ann Højgaard Slot upp listaframsýning í Glarsmiðjuni í Dr. Jacobsensgøtu 7 í Havn. Á framsýningini, sum er opin til 1. desember, hevur hon 22 nýggjar akryl- og akvarelmálningar, og myndaevnini eru fuglar, fuglabjørg og bygdalýsingar. Listakvinnan, sum býr í Århus, er útbúgvin lærari, men er nú farin undir útbúgving til ídnaðarsniðgeva. Framsýningin í Glarsmiðjuni er opin kl. 10 til 17.30.

# búskaparligu realitetirnar



*Rani Nolsøe og Kristian Eli Zachariassen ásanna, at tað saktans kann vera rætt at "ekspandera" búskapin" og økja skuldina í einum avmarkaðum tíðarskeiði. - Men vit eiga so sanniliga eisini at taka avleiðingarnar av hesum og tryggja okkum, at rímiligt lutfall er millum tað, vit samtykkja og tað, vit krevja inn í skatti*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Pát við báðar**

Sosialurin hevði vitjan av Rana Nolsøe og Kristian Eli Zachariassen á gólvinum á Norðoyaredaktiónini í gjár.

Rani, sum situr á aðrari setuni í býráðnum, er eitt nú formaður í heilsu-og umhvørvisnevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og limur í mentanarnevndini.

Kristian, sum fyrstu ferð situr í býráðnum, er limur í fíggjarnevndini, havnanevndini, mentanarnevndini og í staðbundnum nevndum.

Kristian sigur, at hann sum fíggjarnevndarlimur sum so tók undir við tilmælinum um fíggjarætlanina fyri 2007.

- Men hinir fíggjarnevndarlimirnir vistu, at eg helti tann vegin, at eg á býráðsfundinum kundi skjóta upp at hækka skattin, og tað var tað, sum eg og Rani gjørdu, tá ið fíggjarætlanin kom til endaliga viðgerð og støðutakan.

Rani og Kristian vísa á, at skattaprosentið í Klaksvíkar kommunu er 20,75%, og tað gevur einar 126 mió krónur í skattainntøku í 2007.

- Høvdu vit hækkað skattaprosentið við einum prosenti, hevði hetta merkt einar 6 mió krónur í eykainntøku, og tað hevði longu bøtt um úrslitið. Tá hevði skuldin hjá kommununi heldur ikki vaksið so nógv, sum útlit eru til, at hon fer at veksa tey næstu árini.

Báðir eru teir samdir um, at skatturin er ríkiliga høgur sum er – og at málið má vera, at skatturin í framtíðini lækkar.

- Men skal skatturin lækkast seinni, er neyðugt at hækka hann nú, tí annars eru eingi útlit til eina lækking seinni.

Uttan í løtuni at kunna siga, at tað er skeivt, vísa teir báðir á, at kommunan hevur "involvera" seg ógvuliga breitt.

- Nógv er sett út í kortið, og av hesum er nógv, sum ikki er framt í verki enn. Tí er spurningurin, um vit alla tíðina skulu taka "nýtt" inn heldur enn at royna at fremja tað, sum longu er slóðað fyri. Vit mugu eisini ansa eftir, at kavabólturin ikki fær ov nógva ferð.

Teir ásanna, at tað hóast alt eru fleiri áhugaverdar privatar verkætlanir, sum kommunan næstan ikki kann siga nei til. Hetta eru góðar verkætlanir, sum kunnu føra til stóra menning í kommununi.

- Vit eru soleiðis ógvuliga fegnir fyri ta menning, sum verið hevur í kommununi seinastu árini.

Teir nevna eitt nú Klingrugarð, sum hevur eydnast ógvuliga væl og góðhavnina í Ánunum, sum er vorðin bæði størri og nógv dýrari enn upprunaliga mett – og handilsmiðdepilin, sum ætlanin er at byggja í Klaksvík.

- Tað vil altíð vera soleiðis, at tað eru nøkur viðurskifti, sum skulu uppfyllast – og vera í lagi, um ein kommuna skal mennast. Vit mugu loysa grundøkjatørvin, skúlaviðurskiftini, barnaansingartørvin, veg- og kloakkviðurskifti, og vit mugu syrgja fyri, at tey gomlu hava tað gott.

Í 2005 bleiv kommunuskuldin hjá Klaksvíkar kommunu umfíggjað eftir avtalu við fíggingarstovn. Í hesum liggur, at rentan varð løgd føst, og kommunan fekk í hesi avtalu tvey avdráttarfrí ár. Soleiðis rindar kommunan eingi avdrøg í 2006 og 2007, men bara rentur av skuldini.

- Tað er órógvandi, at kommunuskuldin er vaksin so nógv seinastu árini, har vit koma at hava stórt hall á fíggjarætlanini trý ár á tað. Hetta merkir, at samlaða skuldin hjá okkum er vorðin trífaldað eftir trimum árum. Meðan útreiðsluvøksturin hevur verið 10%, hevur inntøkuvøksturin bert verið 5%, og tað er hetta, vit vilja vísa á, so borgin veit, hvar vit standa.

Býráðslimirnir halda, at borgarar í Klaksvíkar kommunu eiga at kenna búskaparligu realitetirnar og tað, sum teir vilja vísa á longu nú, er tað neyðuga í at halda fast um ein búskaparpolitikk, sum í longdini hongur saman.

- Vit kunnu ikki bara sleppa endanum og lata standa til í tíðum sum hesum, siga Rani Nolsøe og Kristian Eli Zachariassen.